# Mugu duga at

-Okur liva í einum samfelag, har tað floymir inn við kunning og tilboðum dag og dagliga. Besta dømið um hetta er alnótin, ið flestu okra nú nýta dagliga. Okur kunnu ikki bert slúka øllum rátt, men okur verða í størri og størri mun noydd at taka støðu. Tí er av alstórum týdningi, at okur duga at hugsa krittiskt; at royna at síggja eina søgu frá fleiri síðum segði Helgi Eidesgaard m.a. tá hann sum nýklækt pisa í Suðri helt røðu á Jóansøku. Vit prenta røðuna



*Nýklæktu pisurnar á jóansøkuhaldinum í ár, har Helgi Eidesgaard helt pisurøðu*

## PISURØÐA Á TVØROYRI

Góðu pisur, foreldur og avvarandi, tvørafólk og suðuroyingar og øll tykur, sum hava leitað tykum á Tvøroyri at halda jóansøku.

Tað er ikki uttan orsøk, at okur standa her í dag. Okur eru nevniliga vorðin liðug við eina miðnámsútbúgving. Eina útbúgving, ið letur upp dyr og gevur okum møguleika at røkka høgum málum. Við hesi útbúgving hava okur lagt lunnar undir vitanarstøði okra - víðkað sjónarringin - og eru nú til reiðar at taka næsta stigið út í lívið. Pisurnar eru floygdar!

Tað er kanska ikki rættiliga gingið upp fyri fleiri okra enn, at okur nú endiliga eru vorðin studentar. Eru okur glað og vónrík? Eru okur í iva um, hvat okur nú skulu gera? Eru okur kedd, tí okur nú fara hvør okra veg út í lívið? Helst hava okur allar hesar kenslurnar samstundis - og tað er kanska ikki so løgið.

Okur eru 25, sum hava fingið prógv frá Suðuroyar Miðnámsskúla í ár. Í 2 flokkum; einum málsligum og einum støddfrøðiligum. Seinastu 3 árini (fyri summi er tað heili 13 ár) hava okur verið saman nærum dagliga; men nú er skúlatíðin í Vági av. Jeg haldi, at jeg tosi fyri øll, tá jeg sigi, at hesi 3 árini ikki altíð hava verið "ein dansur á rósum", sum orðafellið sigur, men samanumtikið hava tað kortini verið 3 góð ár. Stóri spurningurin er so: "Hvat nú?"

Spyr nakrar av nýfloygdu pisunum, og tað er stórt sannlíki fyri, at tú fært sera ymisk svar - og tað er sjálvandi bara gott - tí hugsið tykum, um okur øll vóru eins og ikki teir einstaklingar, okur í roynd og veru eru - teir einstaklingar við teimum eginleikum, ið gera, at okur øll hvør í okra lagi eru serstøk..

Hóast einstaklingar, er menniskjan tó eisini ein sosial vera. Tað sæst aftur í øllum frá familju, vinum, skúlafeløgum, arbeiðsfeløgum o.s.fr. Okur einstaklingar mynda øll í felag samfelagið... hvør á okra egna serstaka hátt! - men tað at vera einstaklingur í einum bólki - og sostatt eisini í samfelagnum - krevur, at okur kenna ábyrgd og virðing fyri hinum, ið saman við okum mynda henda bólk ella hetta samfelag.

"Ábyrgdin á tínum herum, gáva frá okkum til tín, byrða, ið tung er at bera, ber hana betur enn vit." Soleiðis sigur Martin Joensen í sanginum Morgun, ið okur sungu til prógvhandanina í gjár. Her verður sipað til ta ábyrgd, ið forfedrar okra hava borið undan okum, og sum okur nú skulu bera víðari. Hetta er ábyrgdin fyri okra samfelag; samfelagnum, okur skulu bera víðari til okra eftirkomarar.

Ábyrgdin er ein tung byrða at bera, men sum orðið samfelag í sær sjálvum sigur, er hetta nakað, okur gera ella hava í felag. Tí mugu og eiga okur at hjálpast at fyri at skapa bestu karmar og kor fyri okum sjálvi og medmenniskjum okra.

Ábyrgdin áleggur okum sostatt at vísa medmenniskum okra samkenslu og næstrakærleika. Hvussu kunnu okur breggja okum av, at okur hava hjartað á røttum stað, um okur bert hugsa um at lívbjarga okum sjálvum. Hevði okur staðið tveir mans - báðir gorhungraðir - og bert jeg fekk eina máltíð, hevði jeg so givið honum helvtina? Hevði jeg etið alt sjálvur, varð jeg kanska mettur, men samstundis verið noyddur at sæð eitt av medmenniskjum mínum líðið hungur. Gav jeg honum helvtina, høvdu okur báðir fingið lætt um svongdina; - uttan tó at eta okum um rygg... Kann nakar koma við haldgóðum grundgevingum um, at tað, ið flest fólk fáa ágóðan av, ikki er besta loysnin? Tað er mín hjartans sannføring, at tær grundgevingarnar ikki eru at finna; í øllum førum havi jeg ikki hoyrt tær enn...

Okra heimur hevur nóg mikið av tilfeingi til, at allir heimsins borgarar kundu havt eitt virðiligt lív, tó sæst órættvísi valda kring allan heimin. Á námsferðini okur vóru á í Bulgaria fyri knøppum ári síðani, búi okur á einum 5'stjørnaðum hotelli. Har var alt, sum droymast kann um; svimjihylur, sauna, handlar, eitt kasino, har mangar krónur dagliga skifta hendur, o.s.fr. Hotellið var umgyrt av vápnaðum vaktum, so ongin óviðkomandi skuldi koma innar. Hugsaði, at hesi óviðkomandi helst vóru tjóvar og aðrir brotsmenn; men tankar mínir gjørdu eina vend, tá okur ein av fyrstu døgunum fóru túr nakrar fáar hundrað metrar frá okra "fornemma" hotelli. Har, upp móti einum lyktapela, sat ein gomul, rukkut kona. Hon sat við krosskastaðum beinum soleiðis, at síða skjúrtið varð "formað" sum ein skál, har peningur frá teimum, ið gingu framvið, kundi sleppast í. Konan sat bert og stardi beint fram í tóma luft, væntaði hálvavegna eina reaktión, tá ið jeg gav henni nøkur oyru, men so var ikki. Jeg ímyndi mær, at menniskju, ið onga lívsgleði hava longur, síggja út sum henda konan. Hon hevur óivað sæð og kent so nógva neyð á egnum kroppi, at øll lívsvón og -gleði var horvin. Var tað hesa konuna, ið vápnaðu vaktirnir skuldu halda burtur frá hotellinum?

Kom í hesum sambandi at hugsa um eitt ørindi í einum



*Nógv nógv fólk var komið at lýða á*